# ÍF hevði KÍ á krókinum



Erling Fles tryggjaði KÍ sigurin, tá hann skoraði til 3-2, eftir at fuglfirðingar annars høvdu verið á odda 2-0
*Savnsmynd*

**Klaksvíkingar vóru óvanliga tamir undan steðginum, tá ið krúkkulið hjá ÍF var frammanfyri við tveimum málum, men so tók heimaliðið seg eitt sindur saman**

KÍ-ÍF
*Jóannes Hansen*

Fótbóltsárið í Klaksvík er liðugt. At lokið var smekkað í longu undan síðsta heimadystinum sást á áskoðarafjøldini. Hon man sjáldan hava verið so lítil, sum hon var hesa ferð, tá ið besta KÍ liðið hevur spælt á heimavølli. Men so skal beinanvegin leggjast afturat, at tað leingi sást lítið - ógvuliga lítið - til, at tað var besta liðið hjá KÍ, sum var á vøllinum.

Hugburðurin var ússaligur. ÍF hevði gjørt álvara av møguleikanum, sum var nevndur í blaðnum leygardagin. Bartal Eliasen, Rúni Elttør og Fritleif í Lambanum vóru ikki á liðnum. Teir vórðu spardir til avgerandi stríðið móti B71 um rættin til síðsta plássið í bestu deildini.

Fleiri, sum hava spælt millum lítið og einki á besta ÍF liðnum í ár, fingu møguleikan hesa ferð. Eitt nú Bárður á Lakjuni, sum var miðvallari í vinstru og sum kom á málskjúttaralistan. Bárður hevur so at siga ikki vant í ár, tí hann hevur verið so skaðaplágaður. Men í neyðini orsaka av fólkatroti høvdu teir hesa ferð heitt á hann um at spæla við. Ein annar var Frank Poulsen, sum loysti Bárð av og harvið spældi fyri fyrstu ferð í 1. deild,og ein triði var John Thomsen, sum ikki hevur verið við í ár, men sum loysti av á miðvøllinum.

### Karstin í hopla

Í Klaksvík varð nevnt, at hetta kanska var gott høvi at fáa staðfest, hvør av teimum báðum klaksvíkingunum í málunum er betri fyri at loysa Jákup Mikkelsen av.
Karstin Joensen í ÍF málinum gjørdi framúr góða reklamu fyri sær sjálvum. Serliga í 1. hálvleiki hevði hann fleiri rimmar bjargingar. Ikki minst tá ið KÍ liðformaðurin, Atli Danielsen, royndi seg við stútara, og tá ið Ovi Nysted, sum hesa ferð var í miðverjuni, royndi seg við skoti, bjargaði Karstin Joensen frágera væl.

Fyri tað mesta var KÍ uppspælið so lítið sannførandi, sum tað ofta hevur verið fyrr í ár. Langar sendingar til skjótu álopsmenninar var reseptin, men tað spurdist lítið burturúr. Flestu sendingarnar vóru ikki nóg neyvar, og ÍF verjan var stinn.

Í hinum endanum hevði dreingjaliðsspælarin Mathias Samuelsen enn eina ferð fingið møguleikan, tí Jákup Mikkelsen ikki var nóg væl fyri at spæla og harvið á vøllinum at siga farvæl við KÍ viðhaldsfólkini. Illa mannaða ÍF liðið megnaði fleiri ferðir at seta lítið sannførandi heimaliðið undir trýst, og undan steðginum megnaði ÍF at leggja seg framum bæði 1-0 og 2-0.

Eftir miss í KÍ uppspælinum fóru fuglfirðingarnir ígjøgnum í borðinum, bólturin varð sendur innfyri málið, har Magni á Lakjuni ikki varð ansaður. Tílíkan møguleika sigur so royndur spælari við so mikið góðum bóltførleika sum Magni á Lakjuni ikki nei takk til. Hann tamdi og setti framvið Mathiasi Samuelsen, sum var sakleysur.

Í seinna førinum, tá ið tað var Bárður á Lakjuni, sum átti síðsta fótin á, var KÍ málverjin ikki heilt so sannførandi, sum hann annars var fyri tað mesta. Bárður royndi seg við skoti úr vinstru. Støðan sá ikki so vandamikil út, men bólturin smeyg sær í málið, og harvið sá tað alt annað enn ljóst út hjá KÍ, tá ið liðini fóru at hvíla seg.

Hetta var merkisverd støða, tí tað kundi hugsast, at heimaliðið hevði meiri at spæla fyri enn gestirnir. ÍF var longu frammanundan í tí støðuni, at teir vóru á níggjunda plássinum, og harvið skuldu teir spæla um rættin at halda fram í deildini. Um KÍ vann, og tað annars vildi væl við, kundu teir enda á fjórða plássinum, meðan tap bar møguleika fyri áttanda plássinum við sær.

### Tóku sær um reiggj

Beinanvegin eftir steðgin fekk KÍ mál. Tað hevði við sær, at eitt vet meiri av ferð kom á heimaliðið. Arnhold Joensen sendi innfyri - tað tóktist sum um talan var um skotroynd - bólturin fór til Jacob Bymar, og so var mál.

Útjavnandi málið skoraði Erling Fles. Eftir innlegg frá Jacob Bymar var ÍF verjan óskipað, og so var lítið fyri hjá Jan Andreasen at skjóta bóltin í málið.

KÍ guvaði víðari og fram móti dystarenda skoraði Erling Fles sigursmálið. Hesa ferðina kom innleggið frá Símuni Joensen, sum eftir steðgin var fluttur av vongverjanum og á miðvøllin í vinstru. Erling Fles var fyrstur á, lyfti upp um málverjan og í málið.

FAKTA

**KÍ-ÍF 3-2 (0-2)**
0-1: Magni á Lakjuni 29.
0-2: Bárður á Lakjuni 40.
1-2: Jacob Bymar 48.
2-2: Jan Andreasen 73.
3-2: Erling Fles 78.
**Dómari:** Dagfinn Olsen
**KÍ:** Mathias Samuelsen - Jan Andreassen, Ovi Nysted, Niclas Niclasen, Símun Joensen - Arnhold Joensen (Kristian á Lakjuni, 83.), Jan Joensen, Atli Danielsen, Frank Joensen (Tórður Lervig, 51.) - Jacob Bymar, Erling Fles
**Gult kort:** eingin
**ÍF:** Karstin Joensen - Teitur Joensen, Høgni Madsen, Áki Petersen, Eyðolvur R. Petersen - Eyðun Rygshamar, Gunnar Nielsen, Høgni Zachariasen (John Thomsen, 71.), Bárður á Lakjuni (Frank Poulsen, 81.) - Sylla Amed, Magni á Lakjuni (Bartal Eliasen, 57.)
**Gult kort:** eingin



# Horsens er á odda

**Eftir tap í toppuppgerðini fór Frem niður um uppflytingarstrikuna, meðan tað gongst illa hjá føroyingunum í Fremad Amager at sleppa framat**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tann av spælarunum í næstbestu donsku deildini, sum føroyingar kenna mest til, sum var mest eyðsýndur hesa ferð, er ikki føroyskur landsliðsspælari. Her verður hugsað um Ulrik Balling, sum fyri tveimum árum síðani var í NSÍ. Nú er hann í Vejle, og har gongur tað væl. Bæði hjá Balling og Vejle. Hesa ferð var Vejle í Ølstykke, og har vunnu teir 4-2. Ulrik Balling skoraði til 0-1 og til 1-2. Higartil hevur gamli NSÍ spælarin skorað sjey mál, og hann er næstbesti málskjúttin í næstbestu deildini.

Vejle er nummar fimm á støðutalvuni. Ovast eru grannarnir hjá Vejle - Horsens. Í fjør vóru teir leingi omanfyri strikuna, men fram móti kappingarenda kiksaði uppflytingin til superliguna. Sunnudagin hevði Horsens vitjan av Nykøbing Falster Alliancen, og tað var ikki lukkuligt, sum Johan B. Hansen og liðfelagarnir fóru við gestunum. NFA tapti 4-0. Johan B. Hansen átti innleggið til síðsta málið, sum varð skorað, tá ið tað restaðu seks minuttir.

Toppdysturin hesa ferð var í Fredericia, har Jón Rói Jacobsen og Frem vitjaðu. Heimaliðið vann 2-1. Teir gjørdu skjótt av. Fyrra málið skoraðu teir í 2. minutti,og í 3. minutti øktu teir til 2-0. Frem minkaði um munin í 18. minutti, men teir megnaðu ikki at javna. Frem tapið var merkisvert á tann hátt, at tað yvirhøvur ikki er komið fyri fyrr í hesum árinum, at tað eftir so lítlari løtu eru farin tvey mál ígjøgnum hjá Jón Róa Jacobsen og hansara monnum.

Fremad Amager var í Køge, har teir søgdu farvæl við venjaran, Michaele Guarini. Í gjár varð hann avloystur av Benny Johansen. Tað verður spennnandi at síggja, hvørjar møguleikar nýggi venjarin fer at geva føroysku spælarunum. Síðstu tíðina hevur tað bara verið Andrew av Fløtum, sum hevur verið á besta liðnum, og hann hevur bara spælt ein part av tíðini.

Soleiðis var tað eisini í Køge. Andrew av Fløtum kom ikki á vøllin eftir steðgin. Tá va støðan 1-0 til heimaliðið, og tá seinna umfarið var fimm minuttir gamalt, var Køge frammanfyri 2-0. Tveir minuttir seinni minkaði Fremad Amager um munin, og tá ið tað restaðu tríggir minuttir, syrgdu Fremad Amager spælararnir fyri, at venjarin fekk eitt stig í farvæl gávu.

HIK, sum higartil hevur verið oddalið, snávaði á heimavøllinum, har teir taptu 1-0 móti botnliðnum Næstved.

Frem er á fjórða plássinum, og Fremad Amager er nummar átta.

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Sonni L. Petersen | EB/S | 13 |
| Súni Olsen | GÍ | 12 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 12 |
| Jacob Bymar | KÍ | 9 |
| Jónhard Frederiksberg | Skála | 9 |
| John Petersen | B36 | 8 |
| Heine Fernandez | HB | 8 |
| Bogi Gregersen | Skála | 8 |
| Egil á Bø | B36 | 7 |
| Anderson | B68 | 7 |
| Sorin Anghel | EB/S | 7 |
| Heðin á Lakjuni | HB | 7 |
| Høgni Zachariassen | ÍF | 7 |
| Erling Fles | KÍ | 7 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 6 |
| Jákup á Borg | HB | 5 |
| Rúni Nolsøe | HB | 5 |
| Magni á Lakjuni | ÍF | 5 |
| Milan Kulic | VB | 5 |
| Símun Samuelsen | VB | 5 |

# FCK er á rættari kós

**Zuma skoraði fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum, og FCK vann fyri triðju ferð á rað, meðan OB enn eina ferð tapti á heimavølli**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Kreppan í FCK er liðug fyri hesa ferð. Leygardagin hevði FCK vitjan av Herfølge. Gamla felagið hjá Jákupi Mikkelsen megnaði fyri viku síðani málleysan javnleik móti Brøndby. Hóast FCK var stórfavorittur hesa ferð, so søgdu bæði úrslitið móti Brøndby og undanfarnu Herfølge vitjanirnar í Parkini, at talan fór ikki at verða um avgreiðsluspurning.

FCK trýsti og kroysti Herfølge, men tað gekk striltið at fáa mál. Tað eydnaðist Hjalta Bo Nørregaard umvegis ein mótstøðumann og kanska eisini Zuma at leggja FCK framum 1-0. Og so var tað, at Zuma, sum ikki hevur spælt nakað serligt higartil í ár, og sum ikki hevur skorað mál, gjørdi eitt tað vakrasta málið í hesum kappingarárinum. Eftir torføra sending tamdi hann a brotsteigarmarkinum við økslini og bróstkassanum, áðrenn hann heilfluktaði dygst inn við stólparótini.

Sunnudagin hevði Brøndby vitjan av botnliðnum Randers. Eingin ivi var um, at heimaliðið var væl betri enn gestirnir, og Brøndby vann 2-0. Brøndby er einsamalt topplið, og teir eru fýra stig undan teimum næstu. Hetta var níggjunda ferðin á rað, at Brøndby fór av vøllinum uttan at hava tapt.

Fyri tveimum vikum síðani var OB oddalið. Síðani hevur ikki gingið væl, og aftur sunnudagin kiksaði hjá teimum. Teir høvdu vitjan av Viborg, sum ikki hevur serliga gott orð á sær, tí teir verða sagdir ikki at vilja vera við til at undirhalda. Viborg vann 2-0, og harvið kjálkast teir upp móti heiðursmerkjaplássunum. Hetta var triðja ferðin á rað, at OB tapti á heimavølli.

AGF er rættuliga komið fyri seg. Hesa ferð vóru teir í Esbjerg, har heimaliðið hevur havt syndarliga byrjan upp á hetta kappingarárið. Heldur ikki móti AGF eydnaðist tað Esbjerg at fáa stig, hóast teir løgdu seg framum. AGF vann 2-1 og Tobias Grahn, sum er svenskur miðvallari hjá AGF, skoraði bæði málini. Eftirnavnið er tað sama sum hjá Ova Grahn, sum fyri fjórðingsøld síðani var miðvallari á svenska landsliðnum.

Silkeborg tapti enn eina ferð. Harvið hava teir tapt seks landskappingardystir á rað. Teir vitjaðu í Aalborg, har heimaliðið hevur verið í svárari kreppu. Úrslitið var 1-0 til heimaliðið, sum harvið fekk eitt sindur av luft í botninum.

Hjá FCM var tað vónbrot, at tað ikki eydnaðist at vinna á stolta heimavøllinum SAS arena í Herning. Úrslitið var 1-1 móti FCN. Hóast teir ikki vunnu, so kunnu teir í Ikast og Herning erpa sær av, at teir í ellivu heimadystum á nýggja vøllinum ikki hava tapt.

Orsaka av HM undankappingardystum verður ikki spælt aftur í superliguni fyrrenn annan leygardag og sunnudag. Leygardagin skal Danmark spæla í Albania, og annan mikudag skulu teir spæla á heimavølli móti Turkalandi.

## 1. deild menn

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 18 | 12 | 5 | 1 | 47 | 18 | 29 | 41 |
| 2 B36 | 18 | 10 | 4 | 4 | 37 | 21 | 16 | 34 |
| 3 Skála | 18 | 9 | 3 | 6 | 32 | 23 | 9 | 30 |
| 4 KÍ | 18 | 6 | 8 | 4 | 25 | 24 | 1 | 26 |
| 5 EB/Streymur | 18 | 7 | 4 | 7 | 30 | 25 | 5 | 25 |
| 6 NSÍ | 18 | 7 | 4 | 7 | 28 | 25 | 3 | 25 |
| 7 VB | 18 | 7 | 4 | 7 | 27 | 24 | 3 | 25 |
| 8 GÍ | 18 | 6 | 5 | 7 | 31 | 35 | -4 | 23 |
| 9 ÍF | 18 | 3 | 3 | 12 | 25 | 51 | -26 | 12 |
| 10 B68 | 18 | 2 | 2 | 14 | 19 | 55 | -36 | 8 |

## 2. deild menn

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 18 | 12 | 2 | 4 | 47 | 24 | 23 | 38 |
| 2 B71 | 18 | 12 | 2 | 4 | 51 | 31 | 20 | 38 |
| 3 AB | 18 | 10 | 3 | 5 | 32 | 25 | 7 | 33 |
| 4 LÍF | 18 | 8 | 5 | 5 | 30 | 28 | 2 | 29 |
| 5 FSV | 18 | 8 | 4 | 6 | 56 | 38 | 18 | 28 |
| 6 Royn | 18 | 9 | 1 | 8 | 40 | 40 | 0 | 28 |
| 7 Sumba | 18 | 6 | 4 | 8 | 25 | 32 | -7 | 22 |
| 8 B36 | 18 | 5 | 3 | 10 | 28 | 49 | -21 | 18 |
| 9 KÍ | 18 | 3 | 4 | 11 | 26 | 39 | -13 | 13 |
| 10 VB | 18 | 1 | 4 | 13 | 19 | 48 | -29 | 7 |

**Danska superligan**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby (S) | 10 | 6 | 3 | 1 | 16 | 6 | 10 | 21 |
| 2 AGF | 10 | 5 | 2 | 3 | 17 | 11 | 6 | 17 |
| 3 Viborg | 10 | 5 | 2 | 3 | 12 | 9 | 3 | 17 |
| 4 FCM | 10 | 5 | 2 | 3 | 14 | 14 | 0 | 17 |
| 5 OB | 10 | 5 | 1 | 4 | 20 | 15 | 5 | 16 |
| 6 FCK (M) | 10 | 4 | 4 | 2 | 17 | 15 | 2 | 16 |
| 7 AaB | 10 | 4 | 1 | 5 | 15 | 12 | 3 | 13 |
| 8 FC Nordsj. | 10 | 3 | 3 | 4 | 11 | 15 | -4 | 12 |
| 9 Esbjerg | 9 | 3 | 1 | 5 | 18 | 16 | 2 | 10 |
| 10 Silkeborg | 10 | 3 | 1 | 6 | 17 | 20 | -3 | 10 |
| 11 Herfølge | 10 | 3 | 1 | 6 | 10 | 21 | -11 | 10 |
| 12 Randers FC | 9 | 2 | 1 | 6 | 7 | 18 | -11 | 7 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

**Danska 1. deild**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HIK | 10 | 6 | 2 | 2 | 20 | 10 | 10 | 20 |
| 2 AC Horsens | 10 | 6 | 2 | 2 | 20 | 10 | 10 | 20 |
| 3 Fredericia | 10 | 5 | 3 | 2 | 20 | 11 | 9 | 18 |
| 4 Frem | 10 | 5 | 3 | 2 | 15 | 7 | 8 | 18 |
| 5 Vejle | 10 | 6 | 0 | 4 | 28 | 24 | 4 | 18 |
| 6 Køge | 10 | 4 | 5 | 1 | 26 | 15 | 11 | 17 |
| 7 Sønderjyske E | 10 | 5 | 2 | 3 | 23 | 12 | 11 | 17 |
| 8 Fremad Am. | 9 | 4 | 3 | 2 | 17 | 10 | 7 | 15 |
| 9 AB | 10 | 4 | 2 | 4 | 17 | 17 | 0 | 14 |
| 10 Skjold | 9 | 4 | 2 | 3 | 16 | 16 | 0 | 14 |
| 11 NFA | 10 | 3 | 3 | 4 | 23 | 23 | 0 | 12 |
| 12 Brønshøj | 9 | 2 | 3 | 4 | 15 | 21 | -6 | 9 |
| 13 Næstved | 10 | 2 | 2 | 6 | 9 | 19 | -10 | 8 |
| 14 B 93 | 10 | 1 | 4 | 5 | 15 | 26 | -11 | 7 |
| 15 Ølstykke | 10 | 1 | 2 | 7 | 10 | 31 | -21 | 5 |
| 16 Dalum | 9 | 1 | 0 | 8 | 12 | 34 | -22 | 3 |

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen, (Frem), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Danska 2. deild**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brabrand | 9 | 6 | 2 | 1 | 26 | 13 | 13 | 20 |
| 2 Jetsmark | 9 | 6 | 2 | 1 | 24 | 13 | 11 | 20 |
| 3 Kolding FC | 9 | 6 | 0 | 3 | 21 | 13 | 8 | 18 |
| 4 Slagelse | 9 | 5 | 3 | 1 | 17 | 10 | 7 | 18 |
| 5 Holbæk | 9 | 5 | 1 | 3 | 17 | 12 | 5 | 16 |
| 6 Glostrup | 9 | 5 | 1 | 3 | 19 | 18 | 1 | 16 |
| 7 Næsby | 9 | 4 | 2 | 3 | 13 | 11 | 2 | 14 |
| 8 B 1909 | 9 | 4 | 1 | 4 | 10 | 11 | -1 | 13 |
| 9 B 1913 | 9 | 3 | 3 | 3 | 15 | 13 | 2 | 12 |
| 10 Hjørring | 9 | 3 | 2 | 4 | 10 | 13 | -3 | 11 |
| 11 Lyngby | 9 | 3 | 1 | 5 | 14 | 14 | 0 | 10 |
| 12 Roskilde | 9 | 3 | 0 | 6 | 9 | 19 | -10 | 9 |
| 13 Aarhus Fr. | 9 | 2 | 2 | 5 | 15 | 15 | 0 | 8 |
| 14 Holstebro | 9 | 2 | 2 | 5 | 11 | 16 | -5 | 8 |
| 15 Kalundborg | 9 | 2 | 2 | 5 | 17 | 23 | -6 | 8 |
| 16 Værløse | 9 | 1 | 0 | 8 | 7 | 31 | -24 | 3 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)